# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Harðir harrar

Tann 2. mai í ár varð Myanmar, fyrr nevnt Burma rakt av ódnini Nargis. Indiskir veðurfrøðingar høvdu frammanundan ávarað hernaðarstýrið í høvuðstaðnum Rangoon móti ódnini, men generalarnir lótust ikki um vón. Tá ódnin var hasað av, lógu fólk í túsundatali eftirá. Tølini á deyðum sveiggja millum 30.000 og 100.000 alt eftir, hvørjum vanlukkutíðindini koma frá. Tað hevur gingið sera striltið hjá altjóðasamfelagnum at fáa neyðhjálpina fram til vanlukkuøkini. Við landamørkini standa stór lið av hjálparfólki við góðari útgerð, eitt nú tjøldum, útgerð at reinsa drekkavatni, flytandi sjúkrahús og annað meira. Men herstjórarnir, sum nú í mong ár hava stýrt landinum við harðari hond, vilja ikki geva hjálparliðunum innferðarloyvi. Hetta er trupult hjá útheiminum at skilja.

Myanmar ella Birma, sum mong enn nevna landið, hevur nú verið undir hernaðarligum einaræði í mong ár. Fólkaræðiliga andstøðan móti herstjórunum við nobelvirðisløntu Aung San Suu Ky á odda er niðurbundin og hevur ikki megnað at reka einaræðisharrarnar frá valdinum. Fleiri ferðir hava stórar mótmælsigongur verið í Rangoon og teimum stóru býunum, men hesi demokratisku mótmælnini eru hvørja ferð bard niður. Aung San Suu Ky, sum nú í mong ár hevur sitið ú húsvarhaldið, stendur sum ein fólkaræðilig fyrimynd fyri demokratisku andstøðuni, men útlitini fyri einum stjórnarskifti eru vánalig. Vesturheimurin hevur yvirhøvur lagt sjógv millum seg og hernaðarstjórnin. Hinvegin hava fleiri av teimum stóru altjóða vinnufyritøkunum framvegis almikið virksemi í landinum og vinna nógvan pening. Barnarbeiði er sera vanligt, og børn verða í hundraðtúsundatali mestsum hildin trælir.

Nú hevur ein ódn so oyðililagt ein part av landinum, støðan er ræðulig og serstakliga nógv børn er meint rakt. So er stóri spurningurin, hví hernaðarjuntan, sum hevur valdið, er so trek at loyva hjálparliðunum inn í landið og út til vanlukkuøkini. Svarið kann vera, at stjórnin sjálv vil sleppa at býta út hjálpina til tess at vinna sær undirtøku. Stjórnin vil taka ímóti útgerð og mati, men ikki hjálparliðunum. Ein onnur orsøk er, at landið er stongt, og eingin sleppur inn uttan mun til ørindi. Hernaðarjuntan vil fyri einhvønn prís forða fólkinum at hava samband við útheimin. Prísin fyri henda vitleysa politikk má fólkið gjalda. Herstjórarnir hava als onga virðing fyri nøkrum – eitt dømið er, at forsætisráðharrin Khin Nyund tekur ikki telefonina, tá aðalskrivari ST ringir til hansara til tess at bjóða landinum ta hjálp, ið ST kann veita. Hesir eru harðir harrar, og alt bendir á, at teir sita tryggir, eitt nú tí India og Kina stuðla teimum og altjóða samfelagið megnar ikki at standa saman um at reka teir frá valdinum. Hetta er bæði synd og spell og taparin er sum ikki einaferð tað vanliga fólkið í Birma/Myanmar.

**Sosialurin**

## Míni royndir av Orðabókagrunninum við Kára á Rógvi sum formanni

**KÁRI DAVIDSEN**



**6. partur**

Men Kári á Rógvu, tú hevur í skjótt 5 ár staðið fyri Orðabókagrunninum sum formaður, hvar blíva orðabøkur sum 1) Føroysk-týsk orðabókin av, sum var byrjað 2000. 2) Hvar er tann Føroysk-danska orðabókin, sum óivað er byrjað fyri 1998. 3) Hvar er tann Tøknifrøðiliga orðabókin? 4) Russisk-føroysk orðabók, hvør hevur ábyrgd av henni? 5) og so ætlar tú at fara undir týsk-føroyska orðabók, og megnar ikki at fáa avgreitt tær 4 fyrrumrøddu. Og loksins so hevur tú mín sann eisini havt ætlanir um at farið undir eina spansk-føroyska orðabók. Hvussu nógvum orðabókahandritum skal Orðabókagrunnurin bøla yvir, áðrenn nakar ger nakað við henda grunn? Teir privatu við Stiðanum og síðan Sprotanum hava loyst teirra setning! Tríggjar alneyðugar orðabøkur Føroya ungdómi og fólki at gagni. Eisini hevur Stiðin givið Samheita orðabókina út. Eftir 16 árum 4 – fýra – orðabøkur. Tað er nakað, sum sæst, og sum forløgini kunnu vera errin av.

Her fari eg aftur at spyrja teg Kári á Rógvi sama spurning, tí í 2007 skuldi føroysk-týsk orðabók koma út, men hon er nú dagførd til 2008, t.v.s., at hon bara fylgir árinum, føroysk-donsk stendur at vera í fyrireiking, hvat merkir hetta á vanligum gerandisføroyskum, so tann vanligi skattgjaldarin kann síggja og skilja, hví tað skal taka so drúgva tíð at fáa hesar orðabøkur avgreiddar. Tær eru byrjaðar ávikavist 2001 og fyri 2000, men hetta er ikki galdandi fyri ta tøknifrøðiligu og føroyskt – donsku orðabókina, sum verða umrøddar 1998 í svari frá Signari á Brúnni, táverandi mentamálaráðharra, í Løgtinginum upp á fyrispurning hjá Bjarna Djurholm. Tað merkir, at tær hava verið ávegis góð 10 ár! ”Nær koma tær út” Ella Kári á Rógvi er bitin vorðin tær ov stórur?

Árið 2007 hevur verið ein fíggjarligur smeitur fyri meg, tí tann 27. mars sendi tú mær soljóðandi teldupost: ”Kæru tit. Jú, hetta sær bara væl út.” Út frá hesum orðum metti eg, at tað var neyðugt at taka tímaniðurskurð í Hoydølum fyri at fáa orðabókina frá hondini, men tá kendi eg ikki tína muru, ella rættari lyndsku. Sáttmálauppskotini snúðu seg í fyrstu atløgu um eina skúlaútgávu á 60.000 leitorð fyri 1.200.000kr. Í miðal merkir hetta, at hvørt leitorð kostar 20kr. Men so kom Jógvan í Lon Jacobsen upp í leikin og spilti mær leikin. Nú ljóðaði sáttmálauppskotið upp á 40.000 leitorð fyri 950.000kr, men tað, sum sær út sum ein sparing, er í veruleikanum ein dýrkan, tí nú kostar hvørt leitorðið 950.000:40.000 = 23,75 kr. Og Føroyar høvdu fingið eitt eiti av eini týsk-føroyskari orðabók, um eg hevði skrivað undir hetta sáttmálauppskot við teirri avleiðing, at tað størra orðabókahandritið óivað ongantíð sá dagsins ljós.

T. 7. desembur 2007 tykist Kári á Rógvi at spæla jólamaður í gávuhýri, tí nú skrivar hann soljóðandi teldupost: ”Vit vilja hækka upphæddina til kr. 1.150.000. fyri ”minnu bókina”

*alternativt*

hækka til kr 1.150.000

… til at fevna um alla bókina teldutøka.

Hetta er jú tað reina gykl, Kári á Rógvi! Tí hesin telduposturin er jú eisini ætlaður Mentamálaráðnum, sum kanska einki kennir nakað til málið frammanundan. Men hetta er jú eingin hækkan, tí tað upprunaliga uppskotið ljóðaði jú upp á 1.200.000 kr., sum varð lækkað niður í 950.000kr, fyri síðan at seta krónuprísin enn hægri fyri hvørt leitorðið enn frammanundan, 1.150.000:40.000 = 28,75. Hetta dugir hvør 1. floks næmingur at síggja, at henda mannagongd er tann reini galimatias.

Til alternativið kann viðmerkjast, at tað ongantíð hevur verið talan um at keypa ”alla bókina”, tí Orðabókagrunnurin hevði, sum tú fyrr hevur víst á á fundum ikki ráðini at rinda fyri ta ”minnu bókina”, so at tosa um at ”hækka til 1.150.000kr fyri alt handritið er beinleiðis at lúgva fyri fólki.

Til Hans Jákup. Kanska skilir tú betur mína støðu nú, og eg skal bert leggja afturat, at tann fíggjarligi smeiturin eru góðar 75.000 kr. fyri skúlaárið 2007-2208, og tað eru eisini eitt sløð av pengum – í míni verð! Nei, kapitalistur havi ongantíð dugað at verið. Har manst tú vera tann stinnari.

Herfyri vart tú so skjótur at sitera orðini ”J'accuse” hjá Émile Zola, um tú hevði verið fyri mismuni í barnsburðarfarloyvi frá tínum arbeiðsgevara, men eg havi ongan annan møguleika við míni ákæru enn at fara í bløðini við hesum vanlukkuliga orðabókapolitikki, sum verður framdur av Orðabókagrunninum við tær sum stavnamanni.

Míni ráð til tín, Kára á Rógvi: Legg frá tær og lat annan persón koma framat, tí verri kann støðan neyvan gerast – og tak báðar nevndarlimirnar við tær.

Ein áheitan til Jenis av Rana, løgtingslim: Set tínar spurningar framaftur enn eina ferð!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.